# Jólakalendarin 2006

## Trøllaommur við grønum hári



– Omma! Hvussu nógvir dagar eru nú eftir til jólaaftan?

Trøllapætur visti væl, men hann ivaðist kortini í, um Trøllaomman hevði mist dagaskil. Frá morgunstundini hevði hon borið vatn inn í trøllasmáttuna, og nú var tað gamla karið á tremur við skvamplandi heitum kelduvatni. Men trøllaommur plaga ikki at vaska sær fleiri dagar undan jólum, men sjálvan Tollaksmessudag, dagin áðrenn jólaaftan.

– Á, Trøllapætur... Tú spyrt og spyrt og spyrt. Ja, trøllabørn kunnu spyrja meira enn gomul trøll kunnu svara. Trøllaomma hevði hug at skjúgva spurningin til viks, ímeðan hon stoytti grønt hagasmyrsl í rúkandi vatnið.

– Omma veit, at tað eru ein, tveir, tríggir, fýra dagar til jóla!

Trøllaomman taldi errin allar fingrarnar á høgru hond, uttan trøllkonufingurin, og skilti í somu løtu hví Trøllapætur undraðist.

– Á, omma tín fer bara at skola sær hárið í dag. Øll eru so fín og uppsnollaði til jóla, at omma eisini má finna upp á okkurt smart. Heldur tú at omma skal koyra grøna mosaliting í hárið?

– Á noy, omma. Tað mást tú ikki gera. Øll gomul trøll hava stórt grátt hár. Hvat heldur tú at børnini í Føroyum høvdu sagt, um tey sóu trøllaommuna við grønum hári?

Trøllaomman stóð sum kánus eina løtu. Ein garrvill omma við grønum hárið, sum syngur og spælur rock´n roll. Ja, hví ikki?! Men kanska skuldi hon bíða við hárvaskinum til Trøllapætur var farin til songar. Og hvat trøllaommur koyra í hárið, ja tað mugu tær sjálvar sleppa at ráða fyri.

Men Trøllapætur hevði eisini annað at hugsa um. Nú vóru bert fáir dagar eftir til jóla, og í morgin ætlaði hann sær í býin at keypa seinastu jólagávurnar. Men hvat skuldi hann geva lítlu fittu Trøllabillu?

Trøllapætur var bráddliga burturi í aðrari verð. Trøllabilla hevði eisini verið í huganum, tá ið hann av fyrstani tíð sang:

*Nógvar trøllagentur,*
*tær vilja mussa meg*
*Tær ganga runt og fjasast,*
*tað eri ikki eg*
*Eg elski bara ommu,*
*hon er mítt eitt og alt*
*Hon ballar meg í mosa,*
*tá ið tað er kalt*

– Nú skal omma balla Trøllapætur og siga ein góða søgu. Men fyrst mugu vit hyggja hvat er í jólakalendaranum.

– Trøllapætur gloymdi beinanvegin alt um fittar Trøllagentur og kvikaði sær at lata lúkuna við 20 talinum upp.




– Hygg omma. Ein stórur dunkur av hársápu. Hevði tað ikki verið ein góð jólagáva?

– Jú, tað hevði omma verið ovurfegin at fingið.

Men um Trøllapætur hugsaði um ommuna ella lítlu fittu Trøllabillu, ja tað er ein onnur søga.




Vit ynskja tær eini góð og hugnalig jól

Tel 345600, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

- so ert tú tryggari